Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Upptøka av lesandi til SJÚKRARØKTARFRØÐING

**Nýggjur flokkur byrjar 4. februar 2008. Umsóknarfreistin er 5. november 2007**

**Útbúgving og møguleikar**

Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing er spennandi og avbjóðandi og tekur 4 ár. Hon gevur heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði – Bachelor of Science (BSc) in Nursing. Útbúgvingin gevur tær fjølbroyttar starvs- og menningarmøguleikar innan heilsuverkið bæði her á landi og uttanlands.

Sum útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nomið tær holla vitan og førleika at útinna sjúkrarøkt, soleiðis at tú upplivir, at tú veruliga kanst gera mun.

**Hølis- og lestrarumstøður**

Hølisumstøður og umstøður skúlans yvirhøvur eru avbera góðar. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin og seinni søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum fluttu fyrr í hesum árinum í nýggj nútímansgjørd høli miðskeiðis í býnum. Alt tilfar og øll útgerð lúka tíðarinnar krøv.

Saman við 120 øðrum lesandi, væl útbúnum lærarum og starvsfólki verður tú partur av einum virknum og vinarligum lestrarumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

**Lestrarvegleiðing**

Lestrarvegleiðari skúlans veitir vegleiðing og góð ráð. Teldupostbústaðurin er: anne.lise.winther@skulin.fo, tlf. 325 265.

**Umsókn**

Teldutøkt umsóknarskjal kann takast niður av heimasíðu skúlans, www.srfs.fo, ella tú ringir 352 250 og biður um at fáa tað sent í postinum. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um upptøkutreytir o.a.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 5. november 2007 og verða sendar til

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
**Jónas Broncks gøta 25**
**FO-100 Tórshavn**

merk brævbjálvan: »Umsókn lesandi«

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
**Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250**
**fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo**

# Størv í Landsmiðstøðini

LMS

**Bókavørður**

Eitt starv sum bókavørður er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um vanligt bókavarðaarbeiði, eitt nú skráseting, røkt, avgreiðslu og ráðgeving.

Starvið fevnir eisini um aðrar *ikki-bókavarðauppgávur* sum bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipanina Aleph/eLib-booking, og hevur bókavørðurin saman við KT-vørðinum ábyrgd av samskiftinum við veitaran av skipanini.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur

- útbúgving sum bókavørður
- royndir við bókasavnsarbeiði
- royndir og/ella áhuga fyri bókhaldi og at nýta FSL-skipanina
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum, og sum kennir til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

**Skrivstovufólk**

Eitt starv sum skrivstovufólk er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um móttøku og avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipaninar Aleph og eLib-booking.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur

- skrivstovuútbúgving/skrivstovuroyndir
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum
- kunnleika til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

**Felags fyri bæði størvini**

Lýkur tú øll ella flestu førleikakrøvini omanfyri, dámar tær at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin, ert tú tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst tær, vit hava brúk fyri.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um størv í fulla tíð. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn**

Umsókn við prógvum, c.v., o.ø. skulu sendast til:
**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 8. oktober 2007**.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

**www.lms.fo** **Landsmiðstøðin**

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

**Nýtt**

# motorsúkkluskeið

Nýtt motorsúkkluskeið byrjar mánadagin tann 1. oktober kl.19:00.



**Tvøroyrar teori og koyriskúli**
**Áki Dimon · Tvøroyri**
**Tlf. 22 14 63 / 37 11 80**




# Nissan Primera 2.0 til sølu

Bilurin sær gott út, koyrir væl, og hevur havt ymsar smærri umvælingar.

Hevur koyrt 187.000 km og er sýnaður í apríl 2006. Skrásettur fyrstu fer: Desember 1991

Umframt summardekk, fylgja píkadekk á felgum við. Til sølu fyri 15.000 kr.

**Tlf. 22 10 70**